# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Margretha Egholm 105 ár



*Margretha, tá ið hin var 101 ára gomul. Mundin er úr Fólkakalendaranum 2006 við myndum av 12 teimum elstu føroyingunum. Myndatakari Anna Katrina Højgaard*

Mikudagin 28. mai er ein stórur føðingardagur í Havn. Hetta er størsti føðingardagur, sum er hildin í býnum, nevniliga heili 105 ár.

Tað eru bert tveir føroyingar, sum frammanundan hava rokkið hendan aldur, nevniliga Johannes Tauser, sum tá búði í Danmark og Drikka á Fløtti frá Gjógv.

Vit hava fingið eitt prát við sonin Jens Petur um lívið hjá mammuni og fara vit eisni at umrøða pápan Petur Egholm, sum doyði í 1954.

### 11 systkin í Miðvági

Margretha er ættað úr Skálalonini í Miðvági. Foreldrini hjá henni vóru Henrietta f. Joensen og Jóannes Niclassen. Hetta var eitt stórt hús, heili 11 børn frá tveimum giftum, og Margretha var fimta barnið í røðini.

Margretha var bert 12 ár, tá ið hon misti mammuna, og tá vóru tey níggju systkin. Hetta hevur ikki verið lætt tá í tíðini. Tað gingu fleiri ár til pápin giftist aftur við Frederikku, sum var av Slættanesi.

Pápin sigldi tey fyrru árini, men seinni gjørdist hann fiskavrakari. Hann var eisini kendur sum góður fleygamaður. Tað var fast, at á hvítusunnu fór hann í bjørgini við seyði og kom aftur við lunda, sum gjørdist hvítusunnudøgurðin.

Í einum so stórum húsi var nóg mikið at gera hjá øllum. Her mátti Margreta eisini taka sítt tørn. Hon minnist væl, tá ið tey dyrkaðu korn undir 1. veraldarbardaga. Hetta varð neyðugt hjá teimum flestu, tí vegna bardagan kom lítið av korni til landið. Korndyrking var eisini arbeiðskrevjandi frá tí kornið varð sáað og inntil tað var malið á kvørnini.

Allir møguleikar at fáa mat á borðið máttu troytast. Ein av hesum møguleikum var, tá ið nógv brim var. Tá fóru tey inn á sandin at heinta kúfisk. Hann varð stoyktur og smakkaði óføra væl. Eisini dugdu tey væl at gera mat burtur úr tara.

So dugdu tey eisini so sera væl at gera knettir, sum smakkaðu so framúr væl. Jens Petur greiðir frá, at eina ferð nógv ár seinni kom hann á gátt hjá systkinabarninum Marnu úr Konoy, sum búði við Gøtugjógv. Hon var dóttir mammubeiggjan Harald. Tá fekk hann júst somu knettir, sum hann kendi frá sínum barndómi, tá ið hann plagdi at vera í Miðvági.

### Út at tæna

Sum ung fór Margretha til Hvalbiar at tæna í Stórstovuni. Hetta var hjá Niels Nattestad, abbi Natta. Her var hon í eini tvey ár. At hon er farin hagar kann hava samband við, at Nattestadnavnið kemur upprunaliga úr Miðvági, so her kann hava verið kennskapur.

Margretha hevur sum nógvar ungar gentur, eisini tá í tíðini, havt útlongsul og hevur viljað upplivað nakað, áðrenn hon giftist.

Tískil fór hon sum ung á kenda húsarhaldsskúlan Haraldsborg í Roskilde. Leiðari her var Anna Bransager Nielsen, sum var ein merkiskvinna. Hon gjørdi sín húsarhaldsskúla til ein tann fremsta í landinum. Her var strangt, men læruríkt. At tað var lærurikt kom eisini til sjóndar hjá Margrethu seinni í lívinum.

Margretha kom aftur til Føroyar og fekk ymisk húspláss. Millum hesi vóru hjá Lenu og Sofus Højgaard. Hann var kendur skipari, ættaður úr Rituvík, og hon var ikki minni kend sum jarðamóður í Havn. Hon var systir Petur, sum Margretha giftist við. Her plagdi seinni presturin Johan Weihe at koma sum smádrongur. Sofus var mammubeiggi hansara. Margretha plagdi at fortelja, at tað undraði ikki hana, at hann gjørdist prestur. Longu sum trý ára gamal plagdi hann at stilla seg á eina stól og halda talu. Margretha va eisini í húsi hjá Evu og Tummas Arge.

Í 1928 giftast Margretha og Petur Egholm. Hann var sonur Onnu Sofíu og Johan Hendrik Egholm. Hetta er ikki eini minni familja enn hjá Margrethu, tí her vóru eisini 11 systkin. Jens Petur hevur átt ikki færri enn 96 systkinabørn. Fyri nøkrum árum síðan var ættarstevna hjá ættini hjá Onnu Sofia og Johan Hendrik. Her vóru um 300. Í næstum skal móðurættin hjá Jens Petur hava stevnu, og her væntast nakað sama tal. Her skal eitt gott høvd til at halda skil á allari familjuni!

### Petur var merkismaður

Petur doyði knappliga í november 1954, bert 56 ára gamal. Her kann verða endurgivið nakað av tí, sum Kjartan Mohr skrivaði um Petur í Dagblaðnum:

"Við Peturi hava vit mist ein hollan Havnarmann. Hann vaks upp í einum teimum mest arbeiðssomu heimum, ið verið hava her á landi. 16 ára gamal kom hann á Müllers kantór til Søren Müller. Hetta var ein tann størsta fyritøkan í Havn. Skjótt sást, at hesin ungi drongur hevði framúrskarandi evnir og var sera arbeiðssamur, og kom hann at vaksa upp saman við virkinum. Hann bleiv at enda ein av teimum leiðandi á kontórinum, eftir at sovæl Søren sum sonur hansara Hans Christoffer andaðust. Hann kom tá til sín doyggjandi dag at starvast saman við fru Müller.

Petur var eisini tann leiðandi maðurin í okkara elsta tryggingarfelag Færøernes Gensidige Forsikringsforening, sum hann hevði stóran áhuga fyri. Sum limur í havnanevndini hevur hann sitið eitt tíðarskeið.

Nú tá ið Sjóvinnubankin skifti nevnd varð hann heitt á Petur, og legði hann sína orku í at fáa bankan á rættan kjøl aftur. Hann var nevndarlimir 1951-1954.

Tað sum eyðkendi Petur eina mest var hansara lyndi, altíð blíður og stillur í sinnalagi, vinsælur og góður at heita á, tá á stóð, serstakliga til at gera okkurt, ið kom Havnini til góðar. Mong eru tey virkir, ið hann hevur verið við til at stuðla."

Umftamt hetta kann verða nevnt, at Petur var ein av stovnarunum av Uvak, sum var ein stór trolarafyritøka frá 30-ini og fram til 50-ini. Saman við beiggja sínum Alfred átti hann eisini Sonju Egholm. Tá ið Petur doyði var hann eisini í leiðsluni á Tryggingarsambandi Føroya."

Dimmalætting skrivar m. a., at Petur "vendte sig fra alting, som havde karakter af hasard, politisk som i enhver anden henseende."

Tað verður eisini sagt um Petur, at hann var ein góður fótbóltsspælari sum ungur.



*Margretha saman við soninum Jens Petur og ommubørnunum Petur og Hanna*

### Hevði neyt

At vera havnarkona, tá ið Margretha var ung, var nakað heilt annað enn í dag. Tey búðu úti í J. C. Svabosgøtu, beint við gamla sjómansskúlan, sum skipasmiðjan nú eigur. Tey høvdu tvær kýr, og hvønn dag gekk Margretha niðan á Egholmstrøð, hetta er trøðin hjá verpápanum, at mjólka. Eisini seldu tey mjólk. Kundarnir settu spannina við hoyggjhúsið, og tá ið liðugt var at mjólka, varð spannin fylt, og fólkini komu eftir henni aftur. Tá var mjólkaprísurin 65 oyru liturin.

Eisini skuldi hoyggjast, og stórur partur av sumrinum fór til tað. Trøðin var stór, einar 9.300 fermetrar. Ein partur av trønni var so nýtt til heimabeiti.

Tey høvdu eisini torvheiðar, har sum Hoyvíksgarður er í dag. Torvið var gott, og tað var ein einfaldur máti at leita eftir góðum torvi. Potað varð niður í jørðina við stongini av eini súklupumpu. Hekk móra í, tá hon var tikin upp aftur, var torvið gott.

### Sum eitt hotell

Sum sagt búðu tey við sjómannsskúlan. Her var sum vera man nógv lív, serliga av ungfólki. Margretha plagdi hýsa næmingum, serligum slíkum sum vóru í ættini, sum jú var sera stór.

Men nógv fleiri komu inn til teirra. Tað var vanligt, at næmingar, sum tey annars kendu, lupu um garðin og inn til Margrethu, tá ið tað var kaffistøðgur. Hetta kundu vera skyldmenn, men eisini slíkir sum tey kendu frá skipunum, sum til dømis Sonju Egholm, sum Petur átti saman við beiggja sínum Alfred. Hesir føldu seg eisini sum ein part av familjuni og vóru eisini vælkomnir.

Blíðskapur var eisini í aðrar mátar. Tá ið skyldfólk komu av bygd í ørindum sluppu tey ikki sum í dag heim aftur sama dag. Hvat var so meira náttúrligt enn at halda til hjá skyldfólkunum í J C Svabosgøtu? Jens Petur minnist, at tað var sum at búgva á einum hotelli.

Jens Petur greiðir frá eitt dømi um tað samband, sum mamman skapti sær í Hvalba. Ein sonur har í húsinum æt Herman. Aftaná krígg-